# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.


## Handilsfólk

**Søkt verður eftir fólki til handil okkara. Arbeiðið umfatar handilsarbeiði og annað fyrifallandi arbeiði. Arbeiðstíðin er hvønn gerandisdag frá kl. 12 - 17.**

**Vit vænta at tú ert:**
- **Álítandi**
- **Fyrikomandi**
- **Røsk/raskur**

## Ergoterapeuti

**Søkt verður eftir ergoterapeuti til avloysarastarv í august 2003. Arbeiðið umfatar ergoterapeutiska viðgerð av børnum við serligum tørvi og ráðgeving.**

**Skrivlig umsókn við avrit av prógvum og viðmælum verður at senda til:
Ergo og hjálpartól
J.C. Svabosgøta 8
100 Tórshavn**

**Umsóknarfreist** í seinasta lagi 27. juni 2003

**Nærri upplýsingar um størvini fáast við at ringja til leiðaran á tel 215 778**

Ergo & Hjálpartól

J.C. Svabosgøta 8 • FR-100 Tórshavn
Tel. 315 777 • Fax 315 772 •Fartel. 215 778
Teldupost: ergo@post.olivant.fo • Heimasíða: www.ergo.fo

Sosialurin 341800



**málingin til húsini fæst í**

**máling & gólv**

Samstundis sum vit selja við stórum avsláttri av okkara málingagoymslu verður latið 10% í avsláttri av máling ið ikki er á útsølu - tilboðið er fyri innflutta máling

Til dømis:
STORMSHIELD
BETONMÁLING 10L fyrr 549,-
**-10%: nú 494,-**

TRÆVERJA 5L fyrr 399,-
**-10% nú 359,-**

SLITSTERK VEGGJAMÁLING
SILKIGLØTT 10L fyrr 499,-
**nú 449,-**

SLITSTERK MATT
VEGGJAMÁLING
10L fyrr 299,-
**-10% nú 269,-**

**Vit selja í løtuni RESTGOYMSLU MÁLING, TAPET OG FLISAR**

**Til dømis: MÁLING úr bert 10,- kr liturin**

**TAPET avsláttur úr 75%**

**stórur avsláttur**

**FLISAR til dømis: 7 kvadratmetur gólv flisar einans 250,- kr í alt**

**Tel 316066** **máling & gólv**

Sosialurin 341800


## Føðingar



*6. februar fingu Rósa (ættað úr Tórshavn) og Pasquale Zarra Jacobsen, Sveis, ein son, sum eitur Baldur. Hann vigaði 760 gr. og var 34 cm. langur.*



*Eg eiti Karen Haahr Naur og eri fødd 21 maj í Odense. Eg vigadi 3230 gram og máldi 51 cm. Foreldur míni eru Martha Haahr og Elias Naur.*

22. mai fingu Súsanna og Áki, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3050 gr.

27. mai fingu Gunna Jacobsen og George Poulsen, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4000 gr.

3. juni fingu Kelna M. Gardshodn og Bjarni Arge, Keypmannahavn eina dóttir hon vigaði 4550 gr. og var 56 cm long.

5. juni fingu Elspa Egilstoft og Petur Elias Nielsen, Sandavági, ein son. Hann var 56 cm langu rog vigaði 3800 gr.

5. juni fingu Mary Joy og Dan K. Thomsen, Svínáir, ein son. Hann var 46 cm langur og vigaði 2155 gr.

6. juni fingu Edith Johansen og Bergur Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2600 gr.



*6. juni gjørdist Tóki á fyrsta sinni stóribeiggi. Tá setti mamman, Edith Johansen, eina lítla systir í verðina. Pápin eitur Bergur Joensen.*

7. juni fingu Joan Mohr Mikkelsen og Carsten Hjaltalin Jensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4050 gr.

9. juni fingu Jonna Hansen og Monrad Mouritsen, Miðvági, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3200 gr.

10. juni fingu Paula S. og Eyðfinnur Guttesen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 4800 gr.

12. juni fingu Asbjørg Selfoss og Hallur Danielsen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigðaði 2860 gr.



## Bina og Heri silvurbrúdleyp

Sunnudagin hava hjúnini Bina Klakstein og Heri Ellingsgaard, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í dag millum kl. 11:00 - 16:00, við ábiti og morgunmati (brunch) í Skálanum í Klaksvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Bina er dóttir Elsebeth Jacobsen og Richard Klakstein; hon starvast sum lærari við skúlan á Ziskatrøð. Heri er sonur Ragnhild og Petur Ova Ellingsgaard; hann er umsjónarmaður á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.


**Sosialurin**

– hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00

fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo

teldupostur: post@sosialurin.fo


## CISV-tiltak í Læraraskúlahøllini

TÍÐINDASKRIV

Sunnudagin kl. 12.30 skipa vit fyri einum tiltaki, sum vit kalla "Fráfaringarfagnaður" út í Læraraskúlahøllini. Tá børnini eru á CISV-legum kring knøttin, hava tey eitt Tjóðarkvøld har tey umboða land sítt. Endamálið við fráfaringarfagnaðinum er, at børnini kunnu vísa nakað at tí tey framføra tá. CISV-kórið verður eisini at hoyra hendan dagin. Um tit hava hug eru tit vælkomin at taka nakrar myndir til blaðið. Um tit vilja vita meira um C.I.S.V. og tiltakið, so kunnu tit ringja til Óla Rubeksen tel: 328013

Vinarliga

**Foreldrabólkurin hjá børnunum sum skulu til Frankaríki**

## Andlát

6. juni
Amanda Joensen, Skopun.
Aksel Krogh, Tórshavn, 77 ár.
8. juni
Sjúrður, lítli sonur Malan og Petur Elias á Svínafløtti, Miðvági.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Ólafur Guðmundsson 90 ár



11. juni fylti Ólafur Guðmundsson í Havn 90 ár. Ólafur er føddur og uppvaksin í Keflavík í Íslandi, sonur Janu, f. Ellefsen, ættað úr Miðvági, og Guðmund H. Ólafsson úr Keflavík.

Hann kom fyrstu ferð til Føroyar á heysti í 1948 til at fáa føroysk skip, ið fiskaðu við Ísland, at tekna seg fyri at keypa agnsild. Í 1949 búsettist hann í Føroyum. Hann avgreiddi íslendsk skip, sum løgdu inn í Føroyum.

Ólafur sá skjótt at grundarlag var fyri einum handli í Føroyum við íslendskum vørum og stovnaði handilin Impo í Vágsbotni. Hann fór undir at innflyta sjóklæðir og arbeiðsklæðir. Hann seldi eisini annað enn íslendskar vørur, sum t.d. oljufýr til hús og dekk til bilar og onnur akfør. Eisini seldi hann íslendskar keks og ikki at gloyma ulpurnar, tær vórðu einki minni enn ein succes. Hann hevur fingist nógv við at selja sild, og tá sildafiskiskapurin tók seg upp í Føroyum, gjørdi Ólafur, saman við Tórshavnar Skipasmiðju, ein sildatunnuvogn til flutning av sildatunnum. Hesir vognar vórðu væl móttiknir og sera hentir. Ólafur hevur virkað sum ein íslendskur umboðsmaður í Føroyum, hann fekk t.d. íslendsk skip hendan vegin til umvælingar á Tórshavnar Skipasmiðju. Hann skaffaði nógvum føroyingum arbeiði í Íslandi bæði við fiskiskipum og arbeiði í fiskivinnuni á landi. Frá tí at Ólafur kom til Føroyar, fyri meira enn 50 árum síðan, hevur hann arbeitt fyri at menna sambandi millum Ísland og Føroyar.

Í oktober 1998 handaði íslendski konsulin í Føroyum, Poul Mohr, honum, vegna íslendska forsetan, Falka-ordanin, ið kann sammetast við riddarakrossinum.

## Annfinnur Heinesen útbúgvin sjónleikari



Sunnudagin 15. juni fær Annfinnur Heinesen handað prógv sum sjónleikari á Sjónleikaraskúlanum í Odense.

Annfinnur er uppvaksin í Klaksvík. Foreldrini eru Ranva Heinesen og Finnur Jacobsen. Annfinnur er 26 ára gamal. Hann tók studentsprógv í 1996 og flutti stutt eftir til Havnar sum nítjan ára gamal.

Fyrstu ferð, hann stóð á palli, var í 1995, tá Klaksvíkar Sjónleikarfelag sýndi Brøðurnir Leyvuhjarta. Síðani spældi hann við í sangleikinum Skeyk í 1997, og longu sama ár var hann á fyrsta sinni við í yrkisleikhópinum hjá Grímu í Leikinum Oliver Twist. Í 1998 spældi hann aftur við Grímu í Dreymur Jóansøkunátt. Fýra ár á ráð - frá 1997 til 2000 - spældi hann eisini við í Òlavsøkukabarettini í Sjónleikarhúsinum í Havn. Fólk kenna kanska eisini Annfinn aftur frá sjónvarpslýsingunum, hann hevur spælt við í og lagt rødd til.

Í 1999 søkti hann á sjónleikarskúla og slapp inn. Tríggir statsgóðkendir sjónleikarskúlar eru í Danmark. Annfinn slapp inn á Teaterskolen í Odense, sum er tilknýttur Odense Teater.

Àttahundrað fólk søktu um at sleppa inn. Eftir at upptøkurnar hava gjørt sítt, sleppa fýra kvinnur og fýra menn inn á hvønn av teimum trimum skúlunum - í Keypmannahavn, Århus og Odense.

Meðan Annfinnur hevur gingið á skúla í Odense, hevur hann verið við í fýra leikum á Odense Teater.

Annars hevur Annfinnur verið frammaliga í judo bæði í Danmark og í Føroyum. Eisini hevur hann stóran áhuga fyri politikki, føroyskum dansi og judo.

Annfinnur hevur ein bróður, Høgni, sum býr í Havn. Annfinnur heldur saman við Elini á Rógvi, og tey bæði hava seinastu fýra árini búð í Odense.

## Nelly Sørensen 40 ár á røntgendeildini



28. mai 2003 hevði Nelly Sørensen arbeitt á røntgendeildini á Landssjúkrahúsinum í 40 ár. Nelly, f. Olsen, er ættað úr Vestmanna, dóttir Herborg og Napoleon Olsen í Vestmanna. Hon byrjaði á Landssjúkrahúsinum 28. mai 1963 og hevur arbeitt í móttøkuni á røntgendeildini. Hon er gift við Petur Sørensen úr Streymnesi. Tey búgva í Havn. Nelly og Petur fingu fimm børn: Herborg, Ólavur, Sveinur, Ruth og Hallur. Ruth andaðist í 1995, bert 16 ára gomul.

## Goerg Otthamar starvast 25 ár hjá politinum



1. mai hevði Georg Otthamar í Havn arbeitt hjá politinum í 25 ár. Georg er føddur og uppvaksin í Havn, sonur Judith og Arthur Otthamar í Havn. Hann er føddur 7. juli 1955. 1. mai 1978 gjørdist hann politistanæmingur, hann var tá 22 ára gamal. Eftir lokna útbúgving varð hann settur sum politistur í Havn frá 1. juni 1980. Í 1993 varð settur sum varaleiðari á kanningardeildini. Frá 1. juli 1998 varð hann í tvey ár í starvi á danska ferðaliðnum. 1. juli 2000 varð hann aftur settur sum varaleiðari á kanningardeildini hjá politinum í Havn. Georg er giftur við Christu, f. Højgaard Hansen, úr Havn, dóttir Ann Britt og Gunnar Hansen. Christa og Georg búgva í Havn og eiga trý børn, tey eru: Gunnbjørn, Anna Helena og Bogi.

## Prógv

28. mai fekk Jóngerð Miné Olsen prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur við Bachelor á Hovedstadens Sygehusfællesskole í Keypmannahavn.

Jógvan Martin Ferjá Joensen, Kollafirði, hevur tann 19. mai tikið dupult prógv sum CMS og cand. merc. í Altjóða Marknaðarføring og Leiðslu á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn.

## Dagurin

**14. juni. Rufinus,** deyður í umleið 300. Rómverskur hermaður, sum saman við øðrum varð tikin av døgum fyri trúar sakir.

**15. juni. Valdimarsdagur.** Danski kongurin Valdimar Sigur vann í orrustuni við Reval í Estlandi í 1219. Søgan sigur, at tá illa stóð til, fell reyður dúkur við hvítum krossi niður av himni. 15. juni í 1912 varð kunngjørt, at hesin dagurin skuldi vera almennur danskur flaggdagur til minnis um sigurin við Reval. Navnið Valdemar er eftir tí russiska Vladimir, ið merkir *mikil í sínum veldi.*

Dagurin eitur eisini **Vitus**, til minnis um ein 12 ára gamlan drong, sum saman við fleiri øðrum varð tikin av døgum í Róm umleið ár 300. Dagurin er annars merkisdagur í Noregs søgu. Á vitusarmessu ár 1184 vann Sverri úr Kirkjubø sigur í sjóbardaganum við Fimreiti í Sogn og gjørdist einakongur í Noregi.

**16. Tycho.** Í 4. ella 5. øld var hann biskupur í Amatus á Kypros.